# Listafólkini stríðast – men politikararnir sova

- Vit síggja alskyns góð initiativ frá okkara listafólki, men ongan respons frá politiska myndugleikanum. Vit mangla framvegis at taka eitt grundleggjandi kjak um, hvat vit vilja við føroyskari mentan, hvønn leiklut hon yvirhøvur skal hava, og hvørt hon skal stuðlast frá almennari síðu ella ikki.

Sum formaður í Mentunargrunni Landsins hevur Rói Patursson hvørt ár ábyrgdina av at umbýta tær 5,6 milliónir krónurnar til føroysk listafólk, sum Mentunargrunnurin fær játtað á fíggjarlógini árliga. Grunnurin er sambært Róa eitt fantastiskt framstig, men hann er skjótur at undirstrika, at við núverandi játtan megnar grunnurin als ikki at nøkta "tann kvalifiseraða eftirspurningin", sum hann málber seg.

- Játtanin skal í øllum førum tvífaldast, áðrenn vit kunnu nøkta tørvin hjá teimum kvalifiseraðu listafólkunum, sum søkja um peningaligan stuðul. Um vit so taka allar aðrar umsøkjarar eisini, sum enn ikki hava etablerað seg, gerst játtanin alt ov lítil, sigur Rói Patursson.

Um vit framhaldandi ynskja føroyska leiklist, føroysk tónlist og føroyskar bókmentir, so krevur tað sambært Róa, at vit her og nú taka eitt grundleggjandi kjak um, hvat vit í roynd og veru vilja við føroyskari mentan. Eitt kjak, sum sambært formanninum í Mentunargrunninum ongantíð hevur fingið gjøgnumbrot í politiska rúminum.

- Summi halda, at mentan als ikki skal stuðlast, og at vit als ikki skulu hava ein virknan almennan mentunarpolitikk. Fair nokk. Men lat okkum so fáa staðfest, at hetta er politiski viljin. Lat okkum um ikki annað fáa eitt breitt politiskt kjak um, hvat vit vilja við føroyskari mentan, um hon skal stuðlast alment, og um mentan yvirhøvur er ein politisk ábyrgd. Tí tað tykist eftirhondini ikki so sjálvsagt, at politikarar halda seg hava ábyrgdina av einum góðum listarligum umhvørvi. Í stóran mun rúmar føroyskur politikkur framvegis ikki hugtakinum "mentan", sigur Rói Patursson.

### Veiðusamfelagið

Rói heldur, at føroyskur politikkur søguliga hevur snúð seg um fisk og samferðslu. Og at okkara politikarar framvegis ikki hava umstillað seg til eitt nýtt samfelag og eina nýggja samtíð, sum krevur, at vit eisini fara at raðfesta onnur øki.

- Føroyskir politikarar tykjast partvís liva við einum farnum samfelagi í mønini, sum ikki setir prís á tey mentanarligu, listarligu og estetisku virðini, sigur formaðurin í Mentunargrunninum. Hann fegnast um tey álit, sum eru gjørd, men harmast um, at tað veruliga kjakið og avgerðirnar ikki koma.

- Vit síggja nøkur upplop av og á, men so doyr kjakið aftur, og føroyskt mentunarlív má framhaldandi finna seg í at virka undir alt ov vánaligum umstøðum. Vónandi fer komandi samgonga at leggja á annan bógv, endar Rói Patursson.

**HíS**

# Ræðslan fyri frælsari list

- Tað besta kontrollið er at lata vera við at játta pening til føroyska list og mentan. Og alt bendir á, at føroyskir politikarar als ikki ynskja at skapa karmar fyri frælsari list.

Tað sigur Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, formaður í Rithøvundafelag Føroya. Spurdur, hvussu hann vil lýsa føroyskan mentanarpolitikk anno 2007, sigur hann seg ikki kunna lýsa ein politikk, sum ikki er til.

- Vit hava jú ongan orðaðan føroyskan mentanarpolitikk í Føroyum, og við støði í teimum láturligu upphæddum, sum verða settar av til føroysk listafólk, er tað eftirhondini trupult at koma til aðra niðurstøðu enn hana, at politiski myndugleikin í Føroyum ikki ynskir eitt virkið mentanarlív, sigur formaðurin í Rithøvundafelagnum.

Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð heldur, at føroyskir politikarar eftir øllum at døma eru ræddir fyri tí fríu listini, sum í síni náttúru er avbjóðandi og flytur mørk. Og besti hátturin at hava tamarhald á listini er at lata vera við at játta neyðuga peningin.

- Tær útsagnir, sum áður eru komnar frá føroyskum politikarum um t.d. sjónleikin Ginusøgur, avdúka, hvør hugburður ræður millum fleiri føroyskar politikarar. Eitt nú hjá táverandi tingliminum Jógvani á Lakjuni, sum í dag er mentamálaráðharri. At hann skuldi gerast mentamálaráðharri eftir slíkar útsagnir, er heilt ótrúligt, sigur formaðurin í Rithøvundafelagnum.

### List sum vinna

Arnbjørn metir, at umstøðurnar fyri føroysk listafólk framvegis eru út av lagi vánaligar. Játtanirnar hækka ikki. Og tey álit um føroyskan mentunarpolitikk, sum eru skrivað, verða ikki førd út í lívið. Samanumtikið er mentan sambært Arnbirni framvegis eitt forfjónað leysingabarn í politisku skipanini og er eisini rættiliga ósjónlig í valskráunum hjá flokkunum nú upp undir valið.

Arnbjørn peikar á Ísland sum dømi um, hvussu íløgur í list og mentan kunnu gerast stórar útflutningsvinnur og geva stórt fíggjarligt avkast. Vegurin fram er sambært Arnbirni ein miðvísur og langsiktaður ekspansivur mentunarpolitikkur, har vit tora at satsa fíggjarliga.

- Men tað hevur eingin politikari í Føroyum hugflog til at hugsa, metir Arnbjørn.

Fremsta ynskið hjá formanninum í Rithøvundafelagnum fyri eina nýggja samgongu er, at játtanin til Mentunargrunn Landsins verður hækkað. Ein játtan, sum í dag er á 5,6 milliónir krónur.

- Álitið frá 2002 mælir til at veita Mentunargrunninum tíggju milliónir, og hetta eigur ein komandi samgongu at seta sær sum mál. Tað eru altso ikki nógvir pengar samanborið við allar tær íløgur, sum annars verða gjørdar, sigur formaðurin í Rithøvundafelagnum at enda.

**HíS**



# NEYÐA

**Fýra fólk, sum vara av føroyskari mentan, hava fingið nóg mikið. Og hvør í sínum lagi eru tey samd um, at føroyskir politikarar tilvitað ella ótilvitað týna tað listarliga umhvørvið í Føroyum. Fyri onkran er orsøkin politisk líkasæla. Fyri onkran annan er talan um ein tilvitaðan politikk, hvørs endamál er at halda listarliga umhvørvinum í Føroyum niðri. Nú rópa tey varskó**

MENTAN

*Heini í Skorini og*
*Anna V. Ellingsgaard*
*heini@sosialurin.fo*
*anna@sosialurin.fo*

Tey eru ónøgd. Og tey eru vónbrotin. Rói Patursson, formaður í Mentunargrunni Landsins, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, formaður í Rithøvundafelagnum, Jenny Petersen, forkvinna á Tjóðpalli Føroya, og Carl Johan Jensen, rithøvundur og limur í umboðsráðnum í Listafólkasambandi Føroya (LISA).

Og kanónin verður vend ímóti føroyskum politikarum, sum sambært teimum fýra hava slept føroyskum listafólki upp á fjall. Fyri summi er talan um líkasælu. Fyri onnur um ein tilvitaðan politikk.

### Tilvitað kúgan

Fyrst og fremst eru tey fýra samd um, at alt ov lítið av peningi verður játtaður. Mentunargrunnurin fær 5,6 milliónir á fíggjarlógini árliga, og Tjóðpallurin fær 3,2 milliónir. Rói Patursson sigur, at játtanin til Mentunargrunnin minst skal tvífaldast, um hann bert skal megna at nøkta eftirspurningin hjá "teimum kvalifiseraðu umsøkjarunum", sum hann málber seg. Tað eru tey listafólkini, sum eru etablerað og hava staðfest sítt virði. Jenny Petersen á Tjóðpallinum sigur, at hon brýtur lógina fyri Tjóðpallin hvønn tann einasta dag, tí hon við síni játtan als ikki megnar at liva upp til krøvini í lógini.

Formaðurin í Rithøvundafelagnum, Arnbjørn Ólavs-